

*Tann triðji G! festivalurin verður hildin í Gøtu og bara í Gøtu. Fyrireikararnir ætla at fáa færri útlendsk nøvn til Føroya at spæla*

# Annlis skal stýra G! festivalinum

**Fyrrverandi landsstýrismaðurin við mentamálum hevur fingið til uppgávu at samskipa næsta G! festivalin, sum verður hildin í Gøtu í juli mánað**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Triði G! festivalurin skal haldast í Gøtu í summar, og fyrireikingarnar til festivalin eru langt síðani byrjaðar.

Í fjør var tal Laufey Blåsvær, sum var samskipari av festivalinum, men hon hevur borið seg undan at standa fyri festivalinum aftur hesaferð. Tí hava fyrireikararnir av festivalinum sett nýtt fólk sum samskipara, og valið er fallið á Annlis Bjarkhamar.

Hon er kanska kendast sum politikari – fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum – men hon var eisini ein av teimum, sum stóð fyri tiltøkunum Free Føroyar, tá ið tey vóru á skránni fyri tveimum og trimum árum síðani.

– Eg havi arbeitt saman við Annlis fyrr, so eg veit, at hon loysir sínar uppgávur til lítar. Hon brennir fyri tí, sum hon fer í holt við, so hon er júst rætta fólkið til G! festivalin, sigur Jón Tyril, sum er formaður í Grót, sum skipar fyri festivalinum.

## Nógv vaksin

G! festivalurin hevur verið hildin tvær ferðir higartil. Fyrst ferð var í 2002, og tá var talan um eitt lítið og fittligt tiltak á sandinum í Gøtugjógv eitt kvøld. Nøkur føroysk og smærri útlendsk nøvn vóru á skránni, og talan av var um eitt hugnaligt kvøld, sum fólk tóku væl undir við.



*Fyrrverandi landsstýrismaðurin fyri Tjóðveldisflokkin, Annlis Bjarkhamar, er nýggjur samskipari fyri G! festivalin*

Í fjør eksploderaði festivalurin til nakað heilt annað – ja, ein rættiligan festival. Nógvir útlendskir bólkar komu til Gøtu at spæla, og eisini stór føroysk nøvn vóru á skránni.

Festivalurin vardi í fýra dagar, har tyngdin lá á fríggjakvøldinum og serliga leygarkvøldinum, tá ið høvuðsnavnið úr Finnlandi, Bomfunk MC´s, spældu fyri stórari mannfjøld.

Umframt framførslurnar á pallinum á sandinum í Gøtugjógv, vóru ein annar pallur á spæliplássinum í bygdini, og dansitiltøk vórðu eisini í ítróttarhøllini á Kambsdali og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

## Bara í Gøtu hesaferð

Annlis Bjarkhamar er farin í gongd við fyrireikingarnar til G! festivalin, og hon hevur nógv, sum hon skal fáa at passa saman.

– Uppgávan hjá samskiparanum er at fáa alt at ganga upp. Hon skal finna ábyrgdarfólk til tær ymsu uppgávurnar, og annars halda í øllum teymunum, sigur Jón Tyril, formaður í Grót.

Ætlanin er, at G! festivalurin hesaferð verður eitt sindur minni spjaddur. Grót ætlar, at øll tiltøkini skulu verða í Gøtu.

– Hetta fer at hava við sær ein betri festival, sum verður meira savnaður á einum staði. Og tað fer eisini at gera tað léttari at skipa fyri, sigur Jón Tyril.

## Færri útlendsk nøvn

Í fjør var ein ørgrynna av útlendskum nøvnum og spældi á G! festivalinum. Talan var um okkurt einstakt kent navn, men fleiri av nøvnunum vóru lítið kend millum breiða almenningin.

Hesaferð verða útlendsku nøvnini væntandi færri í tali.

– Vit ætla at fáa færri, men kanska eitt sindur dýrari nøvn til Gøtu at spæla, sigur Jón Tyril.

Hann vil ikki siga nakað um, hvørji nøvn arbeitt verður við. Hóast tað ljóðar sum, at okkurt er á veg, so er enn einki navn alment.

– Vit fáa nógvar fyrispurningar um festivalin, og tað tykist sum um festivalurin er kendur uttanlands. Vit hava fingið onkran fyrispurningin heilt úr India.

G! festivalurin 2004 verður hildin í Gøtu í døgunum frá 16. til 18. juli.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi á merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Skraddararnir & Cosméto:

## Skraddaraseymað klæði og kosmetologisk viðgerð

**Mánadagin 19. januar var móttøka í Niels Finsensgøtu 38, í sambandi við at ein nýggjur skraddaraverkstaður og ein vakurleikastova læt upp í niðaru hæddini.**

Tað eru tær báðar Beinta Vilhelmsen og Sólvør Jacobsen, sum hava latið upp skraddaraverkstaðin. Tær eru báðar úr Havn og hava lært til skraddarar í Keypmannahavn.

Beinta og Sólvør eru bæði damu- og harraskraddarar og gera øll sløg av klæðum og búnum sum t.d. brúðarklæðir til brúður og brúðgóm og veitsluklæðir. Kundarnir fáa klæðir gjørd eftir egnum ynski. Eisini verða allar umvælingar av klæðum og búnum gjørdar.

Tær vóru á framsýningini Gluggaglæma í heyst, og 26. februar skulu tær hava mótasýning í Kagganum.



*Hesar eru tær ið reka Skraddararnir og Cosméto í niðaru hædd í Niels Finsensgøtu 38, f.v. Beinta Vilhelmsen, Maria Vilhelmsen og Sólvør Jacobsen. Beinta er dóttir Mariu.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tær gera eisini klæðir til at selja.

Vakurleikastovuna Cosméto rekur Maria Vilhelmsen, sum er útbúgvin kosmetologur. Hon hevur áður arbeitt sum kosmetologur á frisørsalongini hjá Ásu í Niels Finsensgøtu.

Hjá Cosméto fæst t.d. andlits- og kroppsmassaga, ymiskar andlitsviðgerðir, ryggviðgerð, eygnahár og brýr, hártøka og voksviðgerð, epilering, manicure og make-up, sjálvbrúnarviðgerð og brúðarspecial. Maria sigur, at viðgerðirnar eru bæði til damur og harrar og til ber eisini at keypa gávukort til tær ymisku viðgerðirnar.

Tey sum t.d. skulu giftast ellu skulu í veitslu kunnu fáa bæði skraddaraseymaði klæðir og verða sett í stand frá topp til tá hjá Skraddarunum og Cosméto í Niels Finsensgøtu.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

25 ár síðan:

## Lýsing frá Lampubúðini og Atlasbúðini

**Áhugaverd lýsing fyri góðum 25 árum síðan frá Lampubúðini og Atlasbúðini, sum lógu yvirav hvørjari aðrari í R.C. Effersøesgøtu.**

Altasbúðin seldi Atlaskøkar og Atlas el-lutir og Lampubúðin seldi tær mest nútímans lampurnar. Fyritøkan kundi eisini bjóða t.d. el-innlegging, levering og uppseting av køkum, húsarhaldstólum, frysti- og el-tænastu. Arbeiðsleiðarar vóru Hjalgrím Davidsen og Kristjan Martin Hansen

Á fyrru myndini er Lampubúðin í R.C. Effersøesgøtu 30, har sum Vinnuhúsið hevur hildið til seinnu árini. Sølustjóri var Emly Nolsøe. Á seinnu myndini er Atlasbúðin í R.C. Effersøesgøtu 21, har sum Akvariubúðin og seinni Sohvelsport hava hildið til. Sølustjóri var Jón Miðberg.





Fakmannshandlarnir

R. C. Effersøesgøta
tlf. 14477 — 13303
3800 Tórshavn

Tá ið tygum keypa breyð, fara tygum so til slaktaran?
— Nei, tygum fara til bakaran!
Í hesum førinum eru tað Lampubúðin og Atlasbúðin, ið eru fakmannshandlar.

Atlasbúðin selur teir væl umtóktu og nógv keyptu Atlas-køkar við Atlas el-lutum. Serkønur maður, ið hevur verið á Atlasverksmiðjuni, gevur tygum allar upplýsingar og óbindandi tilboð.

Lampubúðin førir allar tær mest nýmótans lampur, og eisini har fáa tygum serkøna hjálp.

Sostatt kunnu tygum trygt fara inn í hesar handlarnar og fáa hesi arbeiði gjørd: el-innlegging í hús, levering og uppseting av Atlas-køkum og el-húsarhaldstólum, frysti- og el-tænastu. Leveransa og uppseting av lampum.

LAMPUBÚÐIN
Sølustjóri: Emly Nolsøe

Arbeiðsleiðarar:
Hjalgrím Davidsen aut. el-innstallatør
og Kristjan Martin Hansen, el-montør

ATLASBÚÐIN
Sølustjóri: Jón Miðberg

Bilarnir á myndini eru eisini áhugaverdir. Við Lampubúðina sæst ein VW Golf og ein Renault 4 vøruvognur hjá Atlasbúðini. Framman fyri Atlasbúðini eru tríggir vørubilar hjá fyritøkuni: Ein Bedford, ein Renault 4 og ein Citroën 2CV.

*Kelda: Myndablaðið NÚ 1978*

### Dagurin

**23. januar. Emerentius.** Navnið er komið skeivt fyri; tað skal vera Emerentiana, deyð umleið ár 300 (í gomlum álmannakkum Emerent). Hon var vinkona við Agnas (Sanktu Agnes), og hon varð steinað til deyða, tá ið hon fylgdi vinkonuni og harðliga hevði at teimum, sum píndu og drupu hana.